

*Trúboðanarskipið Doulos, hjá OM Ships International, vitjar í Føroyum frá 24. juni til 5. juli. Skipari er Árni Jensen úr Havn*
*Mynd: OM Ships International*

# Heimsins størsta flótandi bókasøla vitjar

**Við havnarmanninum Árna Jensen á brúnni stevnir trúboðanarskipið Doulos, hjá felagsskapinum OM Ships International, inn á Havnina hósdagin 24. juni. Skipið vitjar eisini í Klaksvík. Skipað verður fyri ymiskum tiltøkum bæði umborð á skipinum og í landi**

TRÚBOÐANARSKIP
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hósdagin 24. juni kl. 18.00 verður almenn móttøka á Vestaru Bryggju í Havn, í sambandi við at trúboðanarskipið Doulos kemur á vitjan. Á móttøkuni verða talur hildnar av umboðum fyri lands- og býarmyndugleikar og samkomuleiðarum. Eisini syngur Ebenezerkórið og hornorkestur Frelsunarhersins spælir. Skipari á Doulos er Árni Jensen úr Havn, og Margith Olsen úr Klaksvík er eisini við skipinum. Í Klaksvík verður somuleiðis móttøka við talum, sangi og hornblástri.

Doulos er bygt í 1914 og er bert sostatt bert tvey ár yngri enn kenda ferðamannaskipið Titanic. Sambært metbókini hjá Guinnes er Doulos heimsins elsta ferðamannaskip í sigling.

Doulos er eisini heimsins størsta flótandi bókasøla. Umborð eru fleiri enn 6.000 ymiskar bøkur. Har eru t.d. kókibøkur, barnabøkur og andaligur lesnaður.

Nógv ymisk tiltøk vera á skránni, sum t.d, vitjanir umborð, samkomuvitjanir í landi, eisini verður altjóða kaffistova umborð, lovsongsløta fyri ung verður í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn, altjóðakvøld í Klaksvík, har ymsar mentanar møtast. o.m.a.

Stóra bókasølan umborð verður opin allar dagarnar.

### OM stovnað í 1957

Kristiligi felagsskapurin OM (Operation Mobilisation), sum var stovnaður í 1957 av amerikanaranum George Verwer, er kendur um allan heim, eisini i Føroyum.

Felagsskapurin er eina mest kendur fyri síni trý skip, ið hava siglt í flestu av heimsins høvum við gleðiboðskapinum. Fyri stuttum tók Peter Maiden úr Onglandi við sum leiðari av felagsskapinum. Hann hevur t.d. skrivað bókina "Tak mítt silvur", sum Sigurd Berghamar umsetti til føroyskt.

Tey fyrstu nógvu árini eftir at fyrsta skipið, Logos, varð keypt, var bert tað eina skipið. Logos var fyrrverandi Umanak, ið sigldi millum Danmark, Føroyar og Grønland. Seinni bleiv so eitt skip keypt afturat, tað fekk navni Doulos, ið merkir tænari, Logos merkir Orðið.

Fyri nøkrum árum síðan sigldi Logos á land, ella rættari á ein flúr í Suðuramerika, og fórst. Øll manningin bjargaðist. Seinni varð Logos II keypt.

Síðan fyrst í 70-unum hava tey trý skipini: Logos, Doulos og Logos II, vitjað meira enn 420 ymsar havnir í fleiri enn 135 londum. Umleið 30 milliónir fólk hava verið umborð á skipunum. Fleiri av teimum vitjandi eru farin í land aftur – bæði við góðum bókum og við vissuni um tað æviga lívið - givið av Honum sum øllum valdar.

Nógvir føroyingar hava verið við hesum trimum skipunum, tíðin teir hava verið umborð er vanliga umleið tvey ár.

Sum flest øllum kunnugt hevur felagskapurin nú keypt Norrönu I, ið hevur fingið navni Logos Hope.

### Nógvir føroyingar verið við

Felagskapurin hevur nógv virksemi runt um í heiminum, tilsamans hava einir 300-400 føroyingar verið við OM - ikki minst um summarið. Aldursmarkið er heilt niður í 14 ár. Ungdómar eru har á kristiligari stevnu, har tey t.d. verða kunnaði um tørvin í heiminum fyri evangeliinum, um hvat OM stendur fyri, bíbilskar meginreglur, og um mentanir í ymsum londum.

Eisini hava fleiri føroyingar verið, í verkinum í landi í eitt ella tvey ár, tað verið seg í Belgia, Týskalandi, Onglandi, ella aðrar staðir.

Logos var í Føroyum í apríl 1983 og Logos II í mai 2001. Ferðirnar hava verið sera væl eydnaðar, og eru tað enn fleiri, ið taka til, hvussu væl tey vórðu móttikin. Fleiri royndu eisini føroyskar rættir. Tað var misjavnt, hvat tey hildu um tað, tey eru jú frá umleið 40 ymiskum tjóðum.

Tey vóru sera glað fyri tað gestablíðni teimum var víst, ikki minst at tey vórðu boðin heim til hús at vitja. Tað uppliva tey ikki ofta aðrastaðni.

Tey vórðu boðin at vitja í ymsum samkomum í Føroyum, eisini vóru nógv vitjandi umborð, millum onnur vóru landsins leiðarar, virkisleiðarar, samkomuleiðarar og mong onnur.

Doulos kemur á Havnina 24. juni og verður liggjandi til 30 juni. Síðan verður farið til Klaksvíkar, og verður skipið liggjandi har til 5 juli, tá tað fer av stað aftur.

Skráin yvir tiltøkini verður lýst í bløðunum ein av komandi døgunum.

Doulos skrivstovan hevur tlf. 585841 (á enskum) og tlf. 585840 (á føroyskum).

Teldupost adr:
doulos@email.fo
heimasíða: www.fo.om.org

Umboðsmaður hjá OM í Føroyum er Hjørleif Vang í Kaldbak.



*Mark Wood úr Suðurafrika (v.m.) og Jason Ambros úr Kanada (h.m.) frá OM hava verið í Føroyum í ein mánað og fyrireika Doulos vitjanina. Her eru teir saman við Hjørleif Vang, OM umboðsmanni í Føroyum*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Óli Biskopstø 60 ár



Í dag verður Óli Biskopstø í Klaksvík 60 ár. Hann er føddur og uppvaksin í Klaksvík, sonur Jancy og Jákup Biskopstø.

Hann er giftur Katrin Purkhús úr Kunoy og eiga tey børnini, Jancy, Jákup og Niels Holm. Abbabørnini eru 3 í tali, Katrin, Victoria og Jóhannes. Í 2001 doyði lítli abbasonurin, sum var uppkallaður eftir Óla.

Óli er sera lítiðlátin maður og ger ikki nógv hóvastak burturúr sær sjálvum, og í ungum árum setti hann sítt álit á Harran. Hjá honum liggur familjan fremst í huga, hann er serstakliga góður við síni og hevur gott samband við tey øll.

Í nøkur ár starvaðist hann sum maskinmaður hjá Phil og Søn, og var hann við í arbeiðnum at gera tunlarnar til Árnafjarðar og Hvannasunds. Seinni var hann í Íslandi, har teir bygdu eina stóra orkustøð.

Í 1971 tók hann prógv sum maskinmeistari, og hevur síðani tá havt sítt starv sum maskinmeistari umborð á skipi. Hann hevur siglt bæði við línubátum, flakatrolarum og er nú í maskinuni á flaggskipi okkara, Norrønu. Hann er sera dugnaligur og nærlagdur í sínum arbeiði.

Óli er musikalskur og dugir at spæla uppá flestu ljóðføri. Hugnaløturnar og merkisdagarnir í familjuni, sum hann hevur sett sín dám á við tónleiki, eru ikki so fáar. Í 1964, tá songkórið í Betesda vitjaði í Danmark, spældi hann á orgul á Ráðhúsplássinum í Keypmannahavn. Í ungu árunum setti hann sín serliga dám á tónleikalívið í Betesda við sínum frálíka songi og guitarspæli.

Eins og pápin, er hann sera áhugaður í øllum, sum hevur við maskinarí at gera. Ein maður segði einaferð, at tað var altíð so áhugavert at hoyra feðgarnar báðar tosa millum sín á VHF-inum, tí tá fekk hann altíð okkurt nýtt at vita um maskinur.

Óla verður ynskt hjartaliga tillukku á føðingardegnum og Harrans signing framyvir.

Fyri 30 árum síðan:

## Stýrimenn og skipsførarar fingu prógv í juni 1974



*Í juni 1974 var próvtøka á Føroya Sjómansskúla fyri stýrimonnum og skipsførarum.*
*21. juni vóru prógvini handaði teimum, sum stóðu royndina.*
*Stýrimenn: Jákup P. Jensen, Sørvágur, Dávur Joensen, Klaksvík, Mads Karlo M. Johannesen, Tórshavn, Eirikur Joensen, Tórshavn, Johannes K. Olsen, Sandur, Elmar Holm Tvøroyri, Thomas M. Sigurðson, Klaksvík, Pole Mikkelsen, Klaksvík, Richardur Hvidbro, Klaksvík, Martin á Kósini, Klaksvík, og Lyder Sørensen, Viðareiði.*
*Skipsførarar: Per Larsen, Porkeri, Trygvi Thomsen, Sumba, Kári millum Garðarnar, Klaksvík, Fritleif Petersen, Tórshavn, Rúni V. Mortensen, Tvøroyri, Clæmint Nicodemusen, Sandur, og Sverri Petersen, Sandur.*
** Persónarnir á myndini eru ikki í somu raðfylgju sum í myndatekstinum*
*Kelda: Myndaárbókin - árið ið fór 1974*

## Hentzar Joensen 90



Tórsdagin 17. juni fyllir ein vælkendur vágbingur 90. Og dog, vágbingur er kanska í so nógv sagt, tí hóast hann hevur búð longri helvtina av ævi síni í Vági, so hevur hann tann dag í dag ein heilt serligan alsk til føðibygd sína Sandvík.

Hentzar varð borin í heim í Sandvík 17 juni 1914, hann er sonur Jákup og Henriettu Joensen í Garðinum í Sandvík. Hann varð næstelstur av 9 systkum, hvarav 4 eru á lívi enn.

Sum so mangir aðrir unglingar, fór Hentzar á skipsdekk sum nýfermdur. Fyrsti túrurin var við Klaksvíksskonnartini Ernestinu, og sjógvurin bleiv hansara arbeiðspláss meginpartin av hansara arbeiðslívi. Hann var eisini ein av teimum mongu íð vóru til lands í Íslandi og arbeiddu í Føroyingahavnini. Meðan hann enn búði í Sandvík tókst hann við útróður saman við bygdarmonnum, ið høvdu útróðrarbátin Torgrím eitt skifti.

Eisini hevur hann roynt seg innan lærarayrki, hetta varð meðan Sandvík lá í læraraloysi, og heitt var á hann um at átaka sær hetta starv í eitt styttri tíðarskeið.

Hann tók skiparaprógv í 1936. Árið eftir í 1937 giftist hann Edith, fødd Mørk. Tey fingu 5 børn. Edith var honum ein so sera góð kona, lívsfrísk, glað og røsk. Hon andaðist brádliga í 1987 og saknurin varð sera svárur hjá Henzari

Í 1955 flutt Henzar og Edith til Vágs. Hentzar sigldi við Vágsskipum hjá Garðamonnunum og Edith fór at arbeiða í fiski hjá sama reiðaríði. Henzar sigldi hjá Garðamonnunum líka til hann legðist uppá land fyrst í 70-árunum. Eftir hetta tókst hann serliga við fiskaarbeiði og var harafturat nevndarlimur í Arbeiðsmannafelagnum Framtíðini í nógv ár. Tað er ongin loyna at Hentzar er javnaðarmaður um ein háls, hansara samhugi er hjá verkafólkinum, og hann legði ikki fingrarnar ímillum, tá ið tingini skuldu sigast, men hóast av lindi eitt sindur snarsintur, so rennur tað líka skjótt av aftur.

Føðingardagurin verður hildin í húsunum hjá Elithu og Massi saman við familjuni, men um onkur hevur hug at heilsa uppá Henzar, eru tey vælkomin ímillum 14 og 17.

Við hesum fáu orðum vilja vit ynskja tær hjartaliga tilukku á 90 ára degnum, og samstundis takka tær fyri alt tað ið tú hevur verið fyri okkum, og at Harrin skal vælsigna tíðina ið eftir er.

**Børnini**

### Prógv



Eirikur Heðinsson Mortensen, Tórshavn, hevur tann 14. juni 2004 lokið prógv sum Bachelor í Teldu- og Búskaparfrøði á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn.

### Dagurin

**17. juni. Bótolvsøka ella bótolvsmessa**. Munkurin Botolphus stovnaði kleystur í Lincolnshire í Onglandi, og býurin Boston eitur eftir honum. Hann doyði umleið ár 680. Navnið Bótolvur ella Bótal hevur verið brúkt sum mansnavn í Føroyum og kemur fyri bæði í samband við jørð og útróðrarmið.